Urtagarðsmaður

Starvið sum kommunalur urtagarðsmaður og umsjónarmaður við býarhegninum hjá Klaksvíkar Kommunu er leyst at søkja.

Løn sambært 14. lønarflokk eftir starvsmannasáttmálanum við eftirlønartrygging, um viðkomandi lúkar treytirnar fyri hesum.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til býráðsskrivaran.

Skrivligar umsóknir skulu verða Klaksvíkar Býráð í hendi í seinasta lagi 20. mai 1983.

Klaksvíkar Býráð

JAVNI
Landsfelagið evnaveikum at bata

Almennur fundur

Javni hevur almennan fund á Eydnuni á Oyrarbakka fríggjadagin 13. mai kl. 20,00.

Egon Hansen, Óli Simonsen og Trygvi Hendriksen tosa um undirvísingarskipanina í Føroyum.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Nevndin

SKALFLEX

betong -og strukturmáling

Fæst nú í 12 ymiskum litum.

Skalflex tettir rivur og slættar veggirnar og heldur í mong ár.

Fæst frá

Arna Samuelsen
Klaksvík
tlf. 55775

FØROYA VANLUKKUTRYGGING

1. SKYLDU TRYGGINGAR
(hjálparmenn og sjómenn)

Tey, ið hava fólk í arbeiði á sjógv ella landi, hava skyldu til at halda arbeiðsfólkið vanlukkutryggjað. Tey, ið vinna meira enn 1/5 av ársinnloguni av sjónum, hava persónliga tryggingarskyldu. Eigarar av skipum og bátum yvir 4 tons hava skyldu til at vanlukkutryggja mannskapið.

2. SJÁLVBODNAR TRYGGINGAR
(arbeiðsvanlukkutrygging, fritíðarvanlukkutrygging og kollektivar ítróttarvanlukkutryggingar)

Vanlukkutryggingin teknar nú trý sløg av persónligum sjálvbodnum tryggingum:

1) Arbeiðsvanlukkutrygging, ið fevnir um alt persónligt arbeiði hjá viðkomandi og eisini yvir vanlukkur, ið henda beinleiðis á veg til og frá arbeiðsplássinum.

2) Fritíðarvanlukkutrygging verður teknað sum uppiskoyti til arbeiðsvanlukkutryggingina, so viðkomandi eisini er vanlukkutryggjaður í allari fritíðini.

3) Kollektivar ítróttarvanlukkutryggingar kunna nú teknast gjøgnum nevndina í viðkomandi ítróttarfelag. Hesar ítróttarvanlukkutryggingar kunna nú teknast gjøgnum nevndina í viðkomandi ítróttarfelag. Hesar ítróttar-vanlukkutryggingar fevna um vanlukkur, ið henda á ítróttarøkinum undir venjing og dystum.

Øll skilafólk og allar skilanevndir hava sínar vanlukkutryggingar í lagi. Vanlukkutryggingin gevur nærri upplýsingar og leiðbeiningar.

Ringið, skrivið ella støkkið inn á gólvið.

FØROYA VANLUKKUTRYGGING S/F
J. H. Schrøtersgøtu 1
Postboks 59 . Telefon 11466 . Tórshavn

PLASTIMO



Hondlensipumpa av heimskenda slagnum Plastimo.
Korrosiónsfrí. Kann monterast í allar vinklar.
Dupultvirkandi. Sera løtt at reinsa. Sýgur upp til 3 metrar. Orka 90 litrar um min. Slangutilseting 35 mm.

kr. 455,-

Handilsvirkið Horn
postboks 1117
3800 Tórshavn

Nýggjan bil og uttanlandaferð til summarið

Íslendskt kvøld á Hotel Føroyum fríggjakvøldið 13. kl. 20

Atgongumerki á 100 kr., ið samstundis er lutaseðil til ferð fyri tvey í eina viku í Reykjavík.

Mótasýning, fólkadansur og servering av døgurða við íslendskum spesialiteti.

Hotel Føroyar

ICELANDAIR

FLOGFELAG FØROYA